# Eingin ferðsla gjøgnum tunnilin

**Mánadagin byrjaðu fólk frá Landsverki arbeiðið við at tryggja loftið í Leynatunlinum. Arbeiðið er mett at vara í umleið tríggjar mánaðir**

SAMFERÐSLA
*Snorri Brend*

Leynatunnilin: Hetta arbeiðið kemur at darva ferðsluni so mikið, at tunnilin verður stongdur fyri allari ferðslu frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 8 til 19.

Meðan arbeitt verður fara bilarnir at koyra eftir við gamla vegnum framvið Leynavatni.

Vegurin fram við Leynavatni er einsporaður, og tí hevur Landsverk sett upp ferðsluljós fyri at leiða ferðsluna so lætt gjøgnum sum gjørligt.

- Roknast kann kortini við eini bíðitíð uppá umleið 10 min. Heitt verður í hesum sambandi á fólk um at sýna stórt varsemi og tolsemi, upplýsir Landsverk.

Um næturnar og um vikuskiftini verður tó koyrandi sum vanligt gjøgnum sjálvan tunnilin.

Hetta vegastrekkið var áður tað, sum bant flogvøllin og bygdirnar vestan fyri við hin partin av landinum. Men so líðandi vaks ferðslan, soleiðis at vegastrekkið ikki var egnað til hesa.

Í 1977 kundi Landsverkfrøðingurin á fyrsta sinni loyva ferðslu gjøgnum henda 760 metrar langa tunnilin.



*Teir arbeiða inni í tunlinum og koma at gera tað í næstan tríggjar mánaðir aftrat*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Færri sengur geva betri rakstur

**Tað eru ikki smávegis umleggingar sum standa tí Psykiatriska Deplinum á Landssjúkrahúsinum fyri í næstum. Spurningurin er um hesar umleggingar eisini fara at kosta størv**

SÁLARSJÚK
*Snorri Brend*

**Landssjúkrahúsið:** Sambært einum uppskoti, sum nú er til hoyringar verða onkrar deildir lagdar saman, meðan aðrar mugu minka um seingjartalið.

Ein annar partur av uppskotinum er at samskipa vaktarskipanina millum fleiri av deildunum.

Endamálið við umleggingunum er at savna tær aktivu viðgerðardeildirnar við akuttfunktiónum fyri seg, og búdeildirnar við fastbúgvandi fyri seg.

Hetta verður gjørt við tí fyri eyga at fáa betri góðsku og kontinuitet fyri hesar bólkar av sjúklingum, og samstundis fáa ein meira rationellan rakstur av deildunum.

## Til hoyringar

Sambært uppskotinum, er ætlanin í fyrsta lagi, at samla teir sjúklingar, sum eru fastbúgvandi á psykiatriska deplinum á deild 4, deild 5 og á deild 7.

Hetta fer at hava við sær, at sjúklingarnir frá deild 6 verða fluttir yvir á deild 4 og deild 7, og at deild 4 og deild 5 verða lagdar saman til eina deild undir somu leiðslu og vaktarskipan.

Í øðrum lagi er ætlanin, at virksemið á dagdeildini verður integrerað í eitt samlað dagtilboð, saman við ergo- og fysioterapi og klubbanum. Í hesum sambandi verður arbeitt við at endurskoða og samskipa tilboðið um psykiatriska rehabilitering til innlagdar og ambulantar sjúklingar.

Í triðja lagi skulu allir sjúklingar, sum ikki eru fastbúgvandi, framyvir bert verða innlagdir á deild 1, deild 2 og á deild 3. Seingjatalið á deild 2 verður sett niður til átta sjúklingar, og deildin er framvegis ætlað at verða afturlatin. Frammøtið á deildini skal endurskoðast og vaktarskipanin samskipast við deild 3.

Endaliga avgerðin um broytingarnar verður ikki tikin fyrr enn starvsfólkið og umboð teirra eru hoyrd, sambært fyrisitingarlógini og starvsfólkapolitikkinum á Landssjúkrahúsinum.

Avgerðin verður eftir ætlan tikin áðrenn hálvan apríl, og hava starvsfólk og umboð teirra nú møguleika at koma við skrivligum viðmerkingum henda komandi mánaðin.

# Nýggjur handil stuðlar missión í fleiri londum

**Alt yvirskotið frá teirri nýggju stuðulsbúðini fer til arbeiðið hjá donsku missiónsrørsluni Danmission. Fleiri føroyingar stuðla hesi rørsluni, sum m.a. hevur knýtt vinarbond millum Føroyar og eitt stift í afrikanska landinum Tanzania**

ENDURNÝTSLA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Tað er ikki á hvørjum degi, at ein nýggjur handil letur upp í Klaksvík.

Tá tað so umsíðir hendir, kann ein líka so væl gera eitt sindur burtur úr hesum. Og tað er júst hetta, sum danska missiónsfelagið Danmission og klaksvíkskonan Malan Mýri ætla komandi leygardag.

Tá letur nevniliga upp ein sonevnd stuðulsbúð í Klaksvík, har møguleiki verður at ogna sær brúkt klæði og brúktar lutir í stórum tali.

Allur innkomni peningurin frá søluni av hesum lutum fer til tað víttfevnda missiónsarbeiðið sum Danmission ger í Afrika, Miðeystri, Asien og í Danmark.

## Markering við lít

Í øðrum londum er rættiliga vanligt við slíkum stuðulsbúðum, og tað eru fleiri missiónsrørslur sum fáa ein rættiliga stóran part av inntøkum sínum júst frá slíkari sølu.

Nú leygardagin verður so høvið hjá klaksvíkingum og norðoyingum annars at keypa í eini slíkari stuðulsbúð í Klaksvík.

Í eina tíð hevur verið arbeitt við hesi ætlanini, og nú er komið so mikið væl áleiðis, at dyrnar verða lætnar upp á fyrsta sinni í hølunum, sum eru riggað til eitt slíkt endamál.

Ein slík løta fer ikki aftur við borðinum uttan at hon skal markerast. Og tað verður hon eisini við lít.

Byrjað verður kl. 10 við at snórurin inn í stuðulsbúðina verður kliptur av fýra persónum: bispinum Hans J. Joensen, borgarstjóranum í Klaksvík Steinbjørn O. Jacobsen, samskiftisskrivaranum í Danmission Torben Holm og av Malan Mýri, sum er leiðari av stuðulsbúðini.

Eftir tað verða øll boðin innar til kaffi og rundstykkir, har landsskrivarin í Danmission, Ruth-Inge Gregersen fer at siga nøkur orð. Hans J. Joensen heldur síðani eina stutta andakt, og fer eisini at siga frá vinarsambondunum millum Føroyar og eitt av stiftunum í Tanzania, ið nevnist Karagwe.

Borgarstjórin í Klaksvík fer somuleiðis at siga nøkur orð, áðrenn samskiftisskrivarin í Danmission sigur frá tí týdningi, sum slíkar stuðulsbúðin hava fyri arbeiðið hjá missiónsrørsluni.

Vónað verður, at undirtøkan verður góð til upplatingina leygardagin. Og at henda undirtøkan fer at vara við í framtíðini.

## Konsert fyri øll

**Fuglafjørður:** Mentanarhúsið í Fuglafirði hevur verið nógv frammi í seinastuni í samband við Prix Føroyar-kappingina. At hetta hølið er vælegnað til konsertir, munnu tey flestu helst vera samd um.

Tað halda eisini tey ungu í Heimamissiónini, sum leygarkvøldið í næstu viku skipa fyri teirri árligu HMU-konsertini á hesum staði.

Sagt verður, at á skránni verður nakað fyri øll við áhuga fyri tónleiki. Tað hevur nevniliga eydnast teimum at fáa fatur á fýra rættiliga ymiskum bólkum til konsertina. Teir fýra eru: Ungdómskórið í Vágunum, Credo, Bjartur og vinfólk, og kendi bólkurin I Am.

Umframt góðan tónleik verður eisini andakt, okkurt til matna og videoklipp á stórskíggja.

**sb.**

## Tey veiða ikki hjá okkum

**Útlendsk veiða:** Eitt yvirlit um útlendsku veiðuna vísir, at nógv lond als ikki hava havt skip í okkara sjóøki seinastu tveir mánaðirnar.

Skip úr Hálandi, Danmark, Týsklandi, Írland, Estlandi, Japan, Grønland og enntá Íslandi hava ongan fiskidag havt í okkara øki í januar og februar í ár.

Hinvegin hava russisk skip havt 471 fiskidagar, norsk 490, fronsk 103 og bretsk skip 35 fiskidagar hesar báðar fyrstu mánaðirnar av árinum. Samanlagt hava hesi skipini havt 1.099 fiskidagar.

**sb.**

## Kelduvatn úr Norðoyatunlinum

**Klaksvík:** Umsitingin í Klaksvíkar kommunu hevur í eina tíð arbeitt við møguleikanum at taka kelduvatn úr Norðoyatunnlinum.

Slíkt arbeiði kostar sjálvandi pening, og fyri at koma víðari við kanningararbeiðinum, er neyðugt við størri fíggjarligari heimild, og tí hevur umsitingin gjørt eina kostnaðarmeting.

Mælt verður her býráðnum til at 500.000 kr. til verkætlanina, og at peningurin verður tikin av íløgukontuni "ymist í samband við Norðoyatunnilin". Og hetta hevur nú býráðið endaliga samtykt.

**sb.**